Erhard Joensen
løgtingsmaður

Nr. 36/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um dagpeningatíðarskeið, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

Ætlar landsstýrismaðurin at broyta ásetingarnar í lógini um dagpening soleiðis at tíðarskeiðið, ið sjúklingar kunnu móttaka dagpening, í serligum førum (í sambandi við drúgva sjúkraviðgerð), kann leingjast út um núverandi 40 vikurnar?

Viðmerkingar:
Núverandi skipan loyvir veiting upp til í mesta lagi 40 vikur, um talan er um sjúku.
Um talan er um arbeiðsskaða, ið er meldaður til Vanlukkutryggingarráðið, og sum verður viðgjørdur eftir Arbeiðsskaðatryggingarlógini, er tó møguligt at verða i skipanini í upp til 2 ár.

Er sjúkrameldingin vegna sjúku harafturímóti longri enn omanfyrinevndu 40 vikurnar, verður sjúklingurin fevndur av § 9 í Forsorgarlógini, sum er fyribils uppihaldspeningur. Hendan veitingin er í løtuni væl lægri enn hægsti dagpeningur.

Umframt at vera ein persónliga sera trupul tíð fyri einstaka sjúklingin, kann hetta harumframt gerast ein stórur fíggjarligur smeitur fyri tey, ið verða rakt.

Tað er ikki óvanligt, at viðgerðartíðin av til dømis krabbasjúkum er væl longri enn 40 vikur, og at sjúklingurin als ikki er førur fyri at átaka sær nakað arbeiði í hesum tíðarskeiðnum.

Talan kann sostatt verða um, at ein stórur partur av inntøkugrundarlagnum hjá viðkomandi er horvin í eitt langt tíðarskeið.

Hetta kann hava vanlukkuligar fíggjarligar avleiðingar fyri viðkomandi.

Danmark, ið vit annars ofta samanbera okkum við á hesum økinum, hevur eina skipan, har ein serlig fráboðan frá serlækna um longda sjúkrameldingar hevur við sær, at sjúklingurin varðveitir rættin til at móttaka sjúkradagpening í eitt longt tíðarskeið.

Á Løgtingi, 12. desember 2019

Erhard Joensen